# Nú verður aftur arbeiði á í stóra flakavirkinum í Vági

*Eydnast tað ikki at leiga gamla Polarfrost út, fer Fiskavirking sjálv undir onkra framleiðslu á tí stóra flakavirkinum í Vági*



*Nú verður tað kanska aftur sum í gomlum døgum í Vági. Eftir at hava ligið stilt í fleiri ár, er nú tann dagur farin at nærkast, har tað aftur verður arbeiði á gamla Polarfrost í Vági. Her er tað gamli vágstrolarin Brimborg, sum liggur við bryggju*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú verður eitt stórt arbeiðspláss afturat skapt í Vági. Tí nú er greitt, at tað stóra flakavirkið í Vàgi skal latast uppaftur.

Hetta er niðurstøðan av einum fundi í farnu viku ímillum Vágs Býráð og Føroya Fiskavirking.

Vágs Býráð hevði annars gjørt av, at bleiv arbeiði ikki aftur á tí stóra flakavirkinum í Vági, varð sáttmálin við Fiskavirking sagdur upp og so noyddust Fiskavirking at taka flakavirkið niður.

Vágs Býráð vildi ikki longur hava tað stóra stykkið, sum virkið stendur á, liggjandi til onga nyttu longur.

Áhugi var fyri tí 6.000 fermetra stóra stykkinum, sum flakavirkið stendur á. Og fyrr í summar gjørdi býráðið av, at megnaði Fiskavirking ikki at seta virkið ígongd aftur, og eydnaðist tað ikki at leiga tað út, vildi býráðið hava virkið burturbeint, so at onkur annar kundi fáa nyttu av stykkinum.

Fyrireikingarnar til at siga sáttmálan upp vóru longu so smátt byrjaðar, men áðrenn endalig stig vórðu tikin, skuldi fundur vera ímillum Fiskavirking og Vágs Býráð um málið.

Hesin fundurin var í farnu viku, og bæði Meinhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking og Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági, eru samdir um, at hetta var ein góður fundur.

Niðurstøðan av fundinum er, at flakavirkið verður undir øllum umstøðum latið uppaftur einaferð í næstum. Tað gjørdi fiskavirking greitt á fundinum.

Stjórin á Fiskavirking sigur, at samráðingar eru við áhugaðar um at leiga virkið. Men spyrst onki burturúr teimum samráðingunum, fer Fiskavirking sjálv undir onkra framleiðslu á virkinum.

Virkið í Vági hevur staðið stilt í fleiri ár nú, so tað krevur ymsar ábøtur.

Eitt nú lekur takið og tað skal nú gerast, umframt at aðrar umvælingar eru neyðugar. Annars er virkið í hampiliga góðum standi innan. Men tað er so mikið stórt, at talan verður altíð um umvælingar, sum kosta eitt sindur.

Meinhard Jacobsen sigur, at ætlanin er at fara undir umvælingarnar í ár.

-So fáa vit at síggja, hvussu leikur fer, sigur hann.

Hann vil tí ikki siga, nær virkið verður latið uppaftur.

-Vit samráðast um at leiga virkið og tær samráðingarnar mugu ganga sína gongd. Men spyrst onki burturúr teimum, ætla vit sjálvir at fara undir onkra framleiðslu, men akkurát nær tað verður, er ringt at siga.

Tað tykist tó vera greitt, at tað verður í eini ikki alt ov fjarðari framtíð, at arbeiði verður aftur á virkinum.

Stjórin á Fiskavirking vil heldur ikki siga, hvørja framleiðslu, hann hugsar um at fara undir í Vági.

Men hann sigur, at Fiskavirking hevur nógv fleiri møguleikar nú, enn hon hevur havt, tí hon er betri fyri fíggjarliga, enn hon hevur verið.

- Vit eru ikki longur ein fyritøka sum ekur á knøunum fíggjarliga, og tað gevur okkum vissar møguleikar, sum vit ikki hava havt, sigur hann.

– Men tað er í øllum førum greitt, at talan skal vera um eina framleiðslu, sum kastar nakað av sær, tí Fiskavirking fer ikki í holt við eitt undirskotsvirki.

Stjórin leggur eisini afturat, at virkið í Vági er so stórt, at skal nakað virksemið vera í tí yvirhøvur, verður tað altíð talan um nógv virksemi fyri at tað skal bera seg.

# Vilja ikki fara aftur til arbeiðis

*– Onki røkist fyri, at 75 børn í Kollafirði sleppa aftur í dagrøkt*



*Miriann Dam er talskvinna hjá dagrøktarmammunum í Kollafirði. Nú hevur hon bara dukkurnar eftir. Børnini, sum plagdu at spæla við dukkurnar eru komin í klemmu í millum kommununa og dagrøktarmammurnar. Dagrøktarmammurnar hava ongan sáttmála og lønin hjá teimum er ikki broytt í 12 ár, og tað vilja tey hava í rættlag nú*

*Mynd: Jens K. Vang*

ÁKI BERTHOLDSEN

Enn røkist onki fyri at dagrøktarmammurnar í Kollafirði fara aftur til arbeiðis í bræði.

Ósemjan ímillum dagrøktarmammurnar og og kommununa nívir fast, tí tilsamans eru tað eini 75 børn, sum ikki sleppa í dagrøkt hjá teimum 15 dagrøktarmammunum í Kollafirði. Børnini eru í aldrinum frá 0 til 10 ár.

Samstundis er verkfallið hjá teimum eisini víðkað, so at allir limir í Føroya Arbeiðarafelag, sum arbeiða hjá Kollafjarðar Kommunu, eisini eru farnir í verkfall.

Tað ber m.a. í sær, at hvørki skúli ella svimjihylur eru vaskað í eina viku, umframt at annað kommunalt arbeiði heldur ikki er gjørt hesa tíðina.

Og nú verkfallið hjá dagrøktarunum fer inn í triðju vikuna í dag, heldur Ingeborg Vinther, at tíðin er búgvin til at leggja harðari trýst á kommununa fyri at fáa semju um ein sáttmála. Men akkurát, hvørji tiltøk, hon hugsar um, kann hon ikki siga enn.

### Ov lítið í løn

Ein av dagrøktarmammunum, Miriann Dam, sum eisini er talskvinna hjá teimum, sigur, at verkfallið er fyrst og fremst ein spurningur um løn.

– Dagrøktarmammurnar í Kollafirði hava ongan sáttmála havt í 12 ár. Og vit fáa enn somu løn, sum vit fingu fyri 12 árum síðani.

– Í meiri enn eitt ár hava vit roynt at fáa sáttmála við kommununa, men til fánýtis. Tí er bikarið nú flotið yvir og vit eru farnar í verkfall.

Dagrøktarmammurnar í Kollafirði fáa 2.588 krónur um mánaðin fyri hvørt barnið. Men ein triðingur av tí eru til útreiðslur, sum standast av at hava børn í dagrøkt, eitt nú til mjólk, mat og til útreiðslur, sum standast av at røkja húsini, tí tey slítast illa av at hava børn í dagrøkt.

– Sostatt er sjálv lønin bara góðar 1.720 krónur um mánaðin fyri hvørt barnið. Og arbeiðsdagurin er 10 tímar og 15 minuttir.

Miriann Dam sigur, at kommunan hevur bjóðað dagrøktarmammunum tað sama, sum tey fáa í Havnini. Tvs, at tær skulu fáa 3.400 krónur um mánaðin fyri tey smærru børnini ímillum 0 og trý ár og 2.700 krónur fyri tey størru børnini yvir trý ár.

– Grundin fyri at gjaldið í Havnini er minni fyri tey størru børnini er, at býráðið vil heldur eggja foreldrunum til at koyra børnini í barnagarð. Tað skal eisini vera minni stríð av at hava eitt størri barn í dagrøkt enn eitt minni.

– Men í Kollafirði er ongin barnagarður. Og tey, sum siga, at tað er minni stríð av einum størri barni enn av einum minni, kunnu ikki vera fólk, sum eiga børn.

– Tí vilja vit hava tað sama í løn fyri øll børnini og tað skal vera góðar 3.000 krónur um mánaðin fyri barnið, sum er miðalgjaldið fyri eitt barn í Havnini.

Men hesum kravi hevur Kommunan blankt víst aftur. Og í løtuni veit ongin,. hvussu tað slepst víðari




# Luksusbilar við smáum prísum...

Júst nú er tann nýggi Nubira Stationcar heimkomin - og teir italsku designararnir hava gjørt tað aftur. Nubira er nú flottari enn nakrantíð.

Útsjóndin er ikki tað einasta góða við Nubira. Bilurin er á tremur av hentari útgerð m.a. sentrallás, servostýring, el-rútar, eldrivin/hitaði síðuspegl, tónaðir rútar og viðlitaðir kúfangarar. Nubira Stationcar hevur harafturat eitt av størstu viðførisrúmum í mun til aðrar bilar í sama flokki (1.840 litrar við niðurløgdum setrum).

Sjálvandi fylgir 3 ára verksmiðjugaranti/100.000 km og 6 ára rustgaranti við Daewoo bilinum.

Komið inn á gólvið hjá Esmari Simonsen á Kambsdali og royn Nubira.

Nubira Stationcar úr bert 168.700 kr. Nubira Sedan úr bert 158.700 kr.

Vælkomin!



Matiz er ein fittur og handligur 5-hurða mini MPV við sentrallás, el-rútar og servostýring.

Úr 99.985,-



Lanos 1,3 ella 1,5. Rúmligur og fjølbroyttur. (í klassa viðToyota Corolla).

Úr 119.985,-



DAEWOO GARANTI 3ár ELLA 100.000 KM 6ár MÓTI RUSTI

Nubira Stationcar úr bert

168.700,-

Sum sedan úr 158.700,-

DAEWOO - ein skilagóð avgerð!

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29